# Undir einum lítlum træi, liggur... ein bókapakki!

**Allarbesta jólagávan er hørð og fýrakantað og keypt í bókabúðini. Sosialurin viðmælir nýggjar føroyskar bókaútgávur í hvørjum blað í jólamánaðinum.**




## Dollin

### Óli Jacobsen hevur skrivað bókina Dollin, sum er um havnarmannin Daniel Jacob Danielsen, vanliga nevndur Dollin.

Hann var trúboðari í Congo 1901-03, ið tá varð stýrt sum eitt blóðugt einaræði av belgiska konginum Lepold II. Byrjanin til endan á valdinum hjá Leopold varð ein kanningarferð eftir Congoánni hjá bretska konslinum Roger Casement, har Dollin var skipari.

Komin heim til Bretlands á heysti 1903 fór Dollin undir eina fundarrøð um støðuna í Congo. Henda fundarrøð var byrjanin til ein fólkarørslu bæði í Bretland, sum var beinleiðis orsøkin til, at Leopold mátti lata Congo frá sær í 1908 til belgiska statin.

Hetta er ein partur av heimssøguni, har ein føroyingur hevur havt ein lyklaleiklut. Hetta verður prógvað millum annað við skjølum út bretskum søvnum. Tí er hetta ein sera forkunnug søga, sum nú er komin út í bók.

*Og til tey ungu...*

## Darlah

### 172 tímar á mánanum

### Virðislønt science-fiction ræðusøga á føroyskum.

Ringt at finna gávu til tey ungu? Ikki meira, tí í ár gevur Bókadeildin eina ordiliga ungdómsskaldsøgu út.

Vit kenna Johan Harstad frá bókini um Buzz Aldrin. Darlah, 172 tímar á mánanum er fyrsta ungdómsbók, ið Johan Harstad hevur skrivað. Hon kom út í Noregi í 2008 og fekk Brageprisen sama ár og er seld til átta lond.

Darlah er ein science-fiction ræðusøga, sum tú hevur ilt við at sleppa úr hondunum, tá ið tú fyrst er byrjað/ur at lesa.

Hon er í stuttum um trý ung úr trimum londum, sum hava vunnið eitt lutakast at sleppa upp á mánan saman við royndum astronautum.

Komin upp á mánan byrja nógvar óhugnaligar hendingar, slíkt sum als ikki átti at hent á mánanum, tá hugsað verður um, at ongin býr har..

Johan Harstad megnar at skriva eina ótrúliga fangandi søgu, sum fær hárini at reisast líka til síðstu síðu.







## Vencil

### Gávan til tey bókmentaðu

Eitt ársrhald av Vencli er sjálvsagda jólagávan til hin bókmentaða. Ritstjórarnir Arnbjørn Ó. Dalsgarð og Oddfríður M. Rasmussen hava sett sær fyri at bøta um korini hjá skaldskapi á føroyskum við at geva út tíðarritið tvær ferðir árliga. Í tíðarritinum er einans skaldskapur á føroyskum.

- Vit meta og vóna, at eitt slíkt tíðarrit kann styðja uppundir lesiførleikan og lesihugin hjá føroyingum at lesa skaldskap á móðurmálinum, samstundis sum tað eggjar rithøvundum og týðarum at skriva meir og betur.

Vit seta okkum hesi mál fyri tíðarritið:

*at verða miðil fyri skaldskap á føroyskum máli*
*at skapa eitt umhvørvi í Føroyum fyri skaldskap*
*at bjóða dygdargóðan skaldskap, sum fevnir um allar stytti skaldskapargreinir*
*at bjóða altjóða skaldskap á føroyskum máli*